# Fiskimálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 01-02-2021 |
| Mál nr.: | 20/00534-11 |
| Málsviðgjørt: | |
| Ummælistíð: | 01-02-2021 til 12-02-2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir botnfiski, rækjum o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2021

(Toskur á Flemish Cap)

### § 1

Í kunngerð nr. 204 frá 22. desember 2020 um veiðu eftir botnfiski, rækjum o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 2 verður sum kapittul 1 a sett:

**“Kapittul 1 a**
**Fiskiskapur eftir toski á Flemish Cap**

*Heildarkvota og býti av kvotuni*

**§ 2 a.** Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2021 fiska í mesta lagi 335 tons av toski í NAFO-deildarøki 3M, Flemish Cap, sum eru føroysk fiskirættindi í NAFO-skipanarøkinum.
*Stk. 2.* Fiskiloyvi at fiska av kvotuni sambært stk. 1 verður latið teimum, sum í 2021 hava rætt til fiskiloyvi í bólki 3, sambært § 18, stk. 1, nr. 2 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Fiskiskapurin eftir kvotuni sambært stk. 1 verður skipaður við egnari árskvotu. Egni kvotuparturin verður roknaður soleiðis:

1) Øll veiða eftir toski á Flemish Cap árini 2013-2020 við fiskifari hjá rættindahavara, sambært stk. 2, sum prosentpartur av øllum fiskiskapi við línu av føroyskum fiskirættindum í NAFO-skipanarøkinum, ið eru tilskilað í samtyktum hjá NAFO, telur 75%. Fiskiskapur av toskakvotu, ið er flutt Føroyum frá øðrum NAFO-limalandi, telur ikki við í uppgerðini.
2) Rætturin til fiskiloyvi, sambært stk. 2, telur 25%.

*Fiskiloyvi*

**§ 2 b.** Fiskiskapur eftir toski á Flemish Cap kann bert fara fram við fiskifari, sum eftir skrivligari umsókn hevur fingið fiskiloyvi frá Vørn til slíkan fiskiskap. Veiðast skal við línu.

Fiskiskapurin er loyvdur frá 1. apríl til og við 31. desember 2021.

**§ 2 c.** Skiparin skal taka sýni av veiðuni og gera kanningar av longd og vekt á toski eftir leiðbeining frá Havstovuni.

**§ 2 d.** Øll veiða av toski, fiskaður á Flemish Cap við fiskiførum undir føroyskum flaggi, skal landast um bryggjukant í Føroyum.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann veiða av toski, fiskaður á Flemish Cap, verða landað uttanlands, um veiðan verður flutt óvirkað til Føroyar, og fyrsta søla av veiðuni fer fram í Føroyum. Tá landað verður uttanlands, skal øll veiðan um eina innvigingarskipan, sum er góðkend av Vørn."

**2.** Í § 13 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Hjáveiðan av toski verður roknað av kvotuni sambært § 2 a, stk. 1 í hesi kunngerð."

**3.** Í § 13 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Í beinleiðis veiði eftir toski í NAFO-deildarøki 3M, Flemish Cap, kann hjáveiðan av kongafiski í mesta lagi vera 1% av samlaðu veiðuni umborð og landaðu veiðuni. Hjáveiðan av kongafiski verður roknað av kvotuni sambært § 3 í hesi kunngerð."

**4.** Í § 26, stk. 1 verður áðrenn "§ 11" sett: "§ 2 b, 2. pkt., § 2 c, § 2 d, stk. 2, 2. pkt.,".

**5.** § 26, stk. 3, 1. pkt verður orðað soleiðis: "Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert